KJAK



Katrin Hovland Kristensen

Virðing fyri trúgv og ymiskleika

Tað er í kvøld skírishóskvøld, og eg siti við nøsini niðri í einari bók og lesi um heilanerva 7, nervus facialis. Normalt taki eg mær frí slíkar dagar, men í kvøld geri eg eitt undantak orsakað av nógva lesnaðinum, ið eg sum medisinlesandi á 3. semestrið skal ígjøgnum.

Og tó. Meðan eg siti og lesi, merki eg ein ófrið í kroppinum. Tankarnir skifta ímillum forløbið á nervus facialis og tað videoklippi fra "Dagur og viku", sum eg sáð fyrr í dag. Í videoklippinum kjakast Rigmor Dam og Bill Justinussen um bókina "Hin stóra bókin um familjur".

Eg lesi á facebook, at nøkur eru sjelkað av, at Rigmor Dam uppá ein ella annan hátt indirekta ákærir Bill Justinussen fyri at vera fyri einum samfelagsstrukturi, ið sæst í Iran, og yvir hennara ákæru um, at børn verða "ofrað á einum skafotti ella einum altari". Hóast hesar orðingar møguliga ikki vóru serliga hóskandi, so er hetta ikki tað, ið skelkar meg. Harímóti eri eg skelkað av mótparti hennara og tí argumentatiónin, ið herfrá kemur.

Um eg havi skilt tað rætt, ynskir Bill Justinussen ikki, at "Hin stóra bókin um familjur" skal vera í barnagørðunum og skúlum.

Sjálv haldi eg, at bókin ikki skal fjernast frá barnagørðum og skúlum. Kortini skilji eg Bill Justinussen og nakað av hansara argumentatión í ein vissan mun. Sum eg síggi tað, so kann "Hin stóra bókin um familjur" nemliga hava og brúkast til tvey endamál:

Endamál eitt:

Eitt informativt amboð til at fortelja børnum, at tað finnast nógv ymisk menniskju í samfelagnum.

Endamál tvey:

Eitt slags propaganda-amboð í føroyska kjakinum millum teirra, ið eru fyri og ímóti samkyndum.

Um eg havi skilt Bill Justinussensa lesarabræv rætt, so er tað nakað ala hetta, ið hann er innið á, tá hann sigur:

"Mest av øllum líkist bókin eini skipaðari roynd at greiða okkara minstu.. frá, at tað m.a. er í lagi at vera samkyndur. At alt er normalt og at øll eru normal uttan mun til frávik."

og

"Tað er álvarsligt at siga børnunum hjá øðrum, hvat er rætt og skeivt.."

Hetta vil eg geva honum púra rætt í.

Tá tað gekk upp fyri mær, at bókin kundi hava og brúkast til hesi tvey endamál, hugdi eg eftir síðuni í "Hin stóra bókin um familjur", ið talan er um - har stóð:

"Nøkur børn eiga tvær mammur ella tveir pápar."

Eg verði noydd til í hesum setningi stendur einki um, at tað er meira rætt ella meira gott at liva sum samkynd/samkyndur. Tað stendur "nøkur børn eiga tvær mammur ella tveir pápar." Punktum.

Sum eg lesi hetta, er tað informativt, og tí útilukki eg, at tað verður brúkt sum eitt propaganda-amboð.

Hesum dugi eg ikki at síggja nakran trupulleika við – tvørturímóti haldi eg, at ein bók við einum tílíkum endamáli kan fortelja børnum, at:

1. onnur mennskju kunnu vera ymisk, og at
2. hesi menniskju skulu virðast sum medmenniskju.

Hetta kann vónandi eisini fyribyrgja happing í barnagørðum og skúlum av børnum frá familjum, ið eru "øðrvísið".

Bill Justinussen pástendur, at foreldur skullu hava rætt til at avgerða, hvat tey vilja informera teirra børn um - hetta er í og fyri seg rætt og gott. Men hvat er tað, slík foreldur ynskja at varða teirra børn frá í hesum førinum? Vitanina um, at onnur børn hava onnur familjumynstur?

Eg skilji væl foreldur, ið vilja "spara" teirra børn frá vitanini um minoritetar, ið gera skaða á onnur, t.d. Pedofil-menniskju, ella um viðurskiftur, ið ikki eru hóskandi børnum at kenna til, t.d. pornagrafibransjuna (eitt dømi, sum Bill Justinussen nevnir í kjakinum í D&V) – men at hava somu tilgongd til ein minoritet, ið ongan skaða gera øðrum, og ið liva sum vanligir samfelagsborgarir, er fyri mær øgiliga ringt at skilja.

Sum eg síggi tað, kann ein slíkur atburður viðføra happing orsakað av, at børnini ikki vita, at tílík familjumynstur finnast og skullu virðast (virðast eisini hóast man trýr, at tað er ein skeivur liviháttur).

Útyvir tað er mín ótti, at ein tílkur atburður vil viðføra marginalisering, tvs. útilukkan, og eina møguliga stigmatisering av samkyndum (nakað, sum eg kann óttast fyri longu í ein vissan mun gongur fyri seg í føroyska samfelagnum).

Tí ynski eg at appellera til foreldur um virkuliga at umhugsa, um hetta er næstrakærleiksfult. Er hetta ein atburður, sum bíblian eggjar okkum til?

Sjálv eri eg trúgvandi kristin, nýgift við einum trúgvandi manni. Vit ynskja bæði tvey, at Jesus og bíblian skal vera grundarsteinurin í okkara lívið. Hóast vit ikki skilja Gud í mun til tað, ið bíblian sigur um homoseksualitet, so trúgva vit, at hjúnalagið er millum mann og kvinnu. Tó viðførur hetta fyri okkum IKKI, at vit – um vit einaferð vælsignast við børnum – ikki vilja informera okkara børn um, at tað finnast børn við samkyndum foreldur.

Harímóti vóni eg, at vit tá fortelja børnum okkara, hvat vit trúgva uppá samstundis við, at vit fortelja teimum, at onnur menniskju ikki neyðturviliga trúgva og liva eftir somu trúgv, og at hesi menniskju kortini skulu virðast og behandlast kærleiksfult.

So at vit kunnu liva í einum samfelagið, har tað er virðing fyri trúgv og ymiskleika.

Leys størv í Tórshavnar kommunu

PEDAGOGAR

Tórshavnar kommuna søkir vegna Dagstovnin við Velbastaðvegin eftir tveimum pedagogum til vøggustovu, annað starvið á 25 tímar, at byrja 1. mai 2013 og hitt starvið á 35 tímar um vikuna, at byrja 15. mai 2013 ella eftir nærri avtalu.

Um pedagogar ikki søkja størvini, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

SETANARVIÐURSKIFTI
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

UMSÓKN
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera hjá Dagstovninum við Velbastaðvegin, Velbastaðvegur 41, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 15. apríl 2013.

NÆRRI FÆST AT VITA
við at venda sær til Monu Rasmussen Mohr, stovnsleiðara, telefon 302180 / 224535 og eisini eru tit vælkomin at hyggja inn á heimasíðuna www.dagstvelb.fo.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið elskaða kona, mamma vermamma og omma okkara

Barbara Sophie MacKay
gift Andreassen

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkið á B8 á Landssjúkrahúsinum fyri góða umsorgan og hjálp.
Tøkk til Hera Joensen, prest, fyri andakt, troystarrík orð og við jarðarferðina. Tøkk til sangarar, berarar, kirkjutænarar og gravara. Tøkk til Rúnu á Heygum og Herluf Lützen fyri vakran sang í kirkjuni. Tøkk til øll tykkum, sum hjálptu til ervið og bakaðu. Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur. Tøkk til tykkum, ið fylgdu henni til hennara síðsta hvíldarstað.

Familjunnar vegna
Guttorm, Gunhild, Petra og Bjartur við familju